# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Diamantbrúdleyp

Hósdagin 2. juli hava hjúnini Angelika og Hilmar Danielsen í Havn diamantbrúdleyp.

Tey eru helst best kend frá Yamaha knallert- og skutarahandlinum í Bøkjarabrekku, sum tey róku í meira enn 30 ár.

Hilmar og Angelika eiga 6 børn: Gunnbjørn, Beinta, Frants, Katrin, Jákup og Sámal. Barnabørnini eru 12 í tali og eitt langabba- og langommubarn.

Dagurin verður hildin saman við børnum og familjum teirra á Hotel Bakkanum í Vági.



†

### Andlát og jarðarferðir

**Heidi Elisa Joensen** fer til gravar úr Sandavágs kirkju hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Heidi, kunnu lata 1 ára gamla soninum Lukas eina gávu, konto í Føroya Banka.

**Dagurin**
**1. juli, Teobaldus,** doyði í 1066. Franskur aðalsmaður, ið á ungum árum velur eitt lív sum einbúgvi. Var fyrst í Luksemburg, ger so pílgrímsferð til Santiago de Compostela í Norðurspania, síðan til Róm og fær sær at enda tilhald í Vincenza í Italia, har hann varð prestvígdur. Andras Samuelsen var føddur í Haldarsvík hendan dagin í 1873.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Koloni Box í Müllers Pakkhúsi

Í Müllers Pakkhúsi letur ein øðrvísi framsýning upp fríggjadagin 3. juli kl. 16. Tað er 21 ára gamli listamaðurin Jóhan Martin Christiansen, sum hevur hesa framsýning undir heitinum Koloni Box.

Um framsýningina sigur Jóhan Martin Christiansen m.a. at í sambandi við at Tórshavnar kommuna hevur verið demokratisk vald kommuna í 100 ár, setti eg mær fyri at skipa fyri hesi framsýningini í Müllers Pakkhúsi. Framsýningin skal endurspegla ella viðmerkja tað at liva í einum fólkaræði, sum samstundis er eitt ræði, ið hevur støðu sum koloni. Hetta er eitt paradoks.

Alt, ið rørir seg í samfelagnum, verður á ein ella annan hátt definerað og skilt út frá hesum – tað at vera ein koloni. Tó er øllum greitt, at Føroyar eru ikki ein vanlig koloni, har Danmark virkar sum kúgandi vald.

Verkætlanin gongur út upp á at visualisera spurningin við at byggja nakrar kassar, sýnisgluggar ella rúm, ið eg velji at kalla Koloni Boxir. Í hvørjum kassa verður eitt evni, sum er ein tvørskurður gjøgnum søguna. Støðið verður tikið í ymiskum føroyskum viðurskiftum, ið siga nakað um hugburð og virðir í Føroyum, bæði í dag og fyrr, sigur Jóhan Martin Christiansen.

Jóhan Martin Christiansen er føddur í í Havn í 1987. Eftir lokið studentsprógv fór hann til Danmarkar á Holbæk Kunsthøjskole í 2007, og síðan 2008 hevur hann gingið á Ærø Kunsthøjskole. Eftir summarferiuna byrjar hann á Malmø Art Academy í Svøríki.

Jóhan Martin hevur verið við á fleiri framsýningum saman við øðrum bæði í Føroyum og í Danmark, umframt at hann hevur havt sjálvstøðugar framsýningar í Føroyum.

Framsýningin verður opin frá 3. til 24. juli, allar dagar frá kl. 12-18. Heimasíða: jmc-art.net

*mg*



*Jóhan Martin Christiansen í Müllers Pakkhúsi saman við Sis Hedegaard, sum eisini hevur gingið á Ærø Kunsthøjskole. Hon er komin úr Danmark at hjálpa til við framsýningini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Lesið Sosialin -so eru tit við!